# Almannamálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 26. september 2017
Mál nr.: 17/00773-7
Málsviðgjørt: PL/MFH/MM

**Løgtingsmál nr. 25/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum** (Tillaging av viðbót til fyritíðarpensjón)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum

(Tillaging av viðbót til fyritíðarpensjón)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 164 frá 24. desember 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 3, nr. 1, 8. rað um viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – støk verður "2014" broytt til: "2018" og "71.928,00" broytt til: "49.452,00".

**2.** Í § 3, nr. 1, 9. rað um viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – gift hvør verður "2014" broytt til: "2018" og "64.944,00" broytt til: "51.420,00".

**3.** Í § 3, nr. 1, 10. rað um viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk verður "2014" broytt til: "2018" og "23.340,00" broytt til: "14.652,00".

**4.** Í § 3, nr. 1, 11. rað um viðbót til miðal fyritíðarpensjón – gift hvør verður "2014" broytt til: "2018" og "20.280,00" broytt til: "18.684,00".

**5.** Í § 3, nr. 1, 12. rað um viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – støk verður "2014" broytt til: "2018" og "22.032,00" broytt til: "13.860,00".

**6.** Í § 3, nr. 1, 13. rað um viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – gift hvør verður "2014" broytt til: "2018" og "17.668,00" broytt til: "17.064,00".

### § 2

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er galdandi fyri útgjald av veitingum frá og við februar 2018.

*Stk. 2.* Árligu veitingarupphæddirnar í § 1, nr. 1 - 6, verða við útgjald í 2018 býttar við 12 og faldaðar við 11.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Uppskotið verður lagt fram í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2018.

Talan er um uppskot til broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum, sum eigur at verða viðgjørt saman við uppskoti til broyting í skattalógini, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggur fram í sama viðfeingi (løgtingsmál nr. 26/2017).

Í hesum uppskotinum verður mælt til, at upphæddirnar til fyritíðarpensjónistar verða tillagaðar soleiðis, at samlaði vøksturin í útgjaldinum – orsakað av skattafrítøku av grundupphædd og útgjaldi av pensjónistafrádrátti – økist fyri tann einstaka við áleið 1.000 kr. mánaðarliga.

Uppskotini bæði hanga sostatt saman, og verða bæði uppskotini samtykt, fara tey samanlagt at tryggja teimum, ið fáa fyritíðarpensjón, ein munandi fíggjarligan lætta komandi ár.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Fyritíðarpensjónin er sett saman av eini skattskyldugari grundupphædd, sum er sama upphædd fyri øll trý pensjónsstigini, og eini skattskyldugari viðbót, sum er ymiskt í mun til pensjónsstig. Harumframt verður veitt ein skattafrí avlamisviðbót (hjá lægstu fyritíðarpensjónistum nevnist hetta eyka viðbót, sum er áleið sama upphædd sum avlamisviðbót). Fyritíðarpensjónistar, ið ikki hava inntøkur av týdningi, og fyritíðarpensjónistar, sum ikki búgva á stovni sambært forsorgarlógini, hava eisini rætt til viðbót til ávísar pensjónistar.

Fyritíðarpensjónistar hava eisini rætt til skattafrádrátt sbrt. § 3 í løgtingslóg um áseting av skatti, sum er 16.200 kr. hjá støkum og 10.500 kr. hjá giftum um árið.

| | **Hægsta ftp** | | **Miðal ftp** | | **Lægsta ftp** | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Støk | Gift | Støk | Gift | Støk | Gift |
| Grundupphædd | 72.360 | 57.492 | 72.360 | 57.492 | 72.360 | 57.492 |
| Viðbót | 71.928 | 64.944 | 23.340 | 20.280 | 22.032 | 17.688 |
| Avlamisviðbót/eyka viðbót | 33.768 | 33.768 | 33.768 | 33.768 | 34.080 | 34.080 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | - | 7.608 | - | 7.608 | - |
| Inntøka áðrenn skatt | 185.664 | 156.204 | 137.076 | 111.540 | 136.080 | 109.260 |
| Skattur og gjøld | 25.840 | 23.076 | 7.010 | 5.724 | 6.489 | 4.715 |
| Inntøka eftir skatt um árið | 159.824 | 133.128 | 130.066 | 105.816 | 129.611 | 104.545 |
| **Inntøka eftir skatt um mðr.** | **13.319** | **11.094** | **10.839** | **8.818** | **10.801** | **8.712** |

*Viðm.: Í dømunum verður gingið út frá, at hjúnafelagin hjá giftum fyritíðarpensjónistum hava inntøku, og harvið verður gingið út frá, at tey ikki hava rætt til viðbót til ávísar pensjónistar.*

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Samgongan hevur sett sær fyri at veita fyritíðarpensjónistum ein fíggjarligan lætta á 1000 kr. um mánaðin við at gera grundupphæddina hjá fyritíðarpensjónistum skattafría og útgjalda óbrúktan pensjónistafrádrátt samstundis, sum at skattskyldugu viðbøturnar, sum fyritíðarpensjónistar fáa, verða stillaðar soleiðis, at vøksturin í útgjaldi verður hóskandi.

Mælt verður tískil til at lækka skattskyldugu viðbøturnar hjá fyritíðarpensjónistum, so at øll, sum fáa fyritíðarpensjón, fáa ein lætta á 1000 kr. um mánaðin.

Hvussu broytingin fer at ávirka fyritíðarpensjónistar verður víst í talvunum niðanfyri. Sum víst hækkar mánaðarliga útgjaldið hjá øllum fyritíðarpensjónistum við 1000 kr. um mánaðin.

| **Hægsta fyritíðarpensjón** | ***Støk*** | ***Gift*** | ***Støk*** | ***Gift*** |
|---|---|---|---|---|
| **Útgoldið sambært galdandi lóg** | ár | ár | mð | mð |
| Grundupphædd | 72.360 | 57.492 | 6.030 | 4.791 |
| Viðbót | 71.928 | 64.944 | 5.994 | 5.412 |
| Avlamisviðbót | 33.768 | 33.768 | 2.814 | 2.814 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 |
| Veitingar íalt | 185.664 | 160.008 | 15.472 | 13.334 |
| **Skattskyldug inntøka** | **144.288** | **122.436** | **12.024** | **10.203** |
| Landsskattur | -11.893 | -8.615 | -991 | -718 |
| Kommunuskattur | -23.189 | -18.755 | -1.932 | -1.563 |
| Skattafrádráttur | 16.200 | 10.500 | 1.350 | 875 |
| Kirkjuskattur | -777 | -629 | -65 | -52 |
| Gjald til Heilsutrygd | -2.966 | -2.835 | -247 | -236 |
| Gjald til AMEG | -3.246 | -2.755 | -271 | -230 |
| Kringvarpsgjald | -1.800 | -1.800 | -150 | -150 |
| **Útgoldið** | **157.992** | **135.119** | **13.166** | **11.260** |

| **Hægsta fyritíðarpensjón**<br>**Útgoldið við broyting** | ***Støk***<br>Ár | ***Gift***<br>ár | ***Støk***<br>mð | ***Gift***<br>mð |
|---|---|---|---|---|
| Grundupphædd | 72.360 | 57.492 | 6.030 | 4.791 |
| Viðbót | 49.452 | 51.420 | 4.121 | 4.285 |
| Avlamisviðbót | 33.768 | 33.768 | 2.814 | 2.814 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 |
| Veitingar íalt | 163.188 | 146.484 | 13.599 | 12.207 |
| **Skattskyldug inntøka** | **49.452** | **51.420** | **4.121** | **4.285** |
| Landsskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kommunuskattur | -3.947 | -4.346 | -329 | -362 |
| Brúktur skattafrádráttur | 4.079 | 4.492 | 340 | 374 |
| Útgoldin skattafrádráttur | 12.121 | 6.008 | 1.010 | 501 |
| Kirkjuskattur | -132 | -146 | -11 | -12 |
| Gjald til Heilsutrygd | -2.397 | -2.409 | -200 | -201 |
| Gjald til AMEG | -1.113 | -1.157 | -93 | -96 |
| Kringvarpsgjald | -1.800 | -1.800 | -150 | -150 |
| **Útgoldið** | **170.000** | **147.127** | **14.167** | **12.261** |
| **Hækking** | **12.007** | **12.007** | **1.001** | **1.001** |

| **Miðal fyritíðarpensjón**<br>**Útgoldið sambært galdandi lóg** | ***Støk***<br>ár | ***Gift***<br>ár | ***Støk***<br>mð | ***Gift***<br>mð |
|---|---|---|---|---|
| Grundupphædd | 72.360 | 57.492 | 6.030 | 4.791 |
| Viðbót | 23.340 | 20.280 | 1.945 | 1.690 |
| Eyka viðbót | 33.768 | 33.768 | 2.814 | 2.814 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 |
| Veitingar íalt | 137.076 | 115.344 | 11.423 | 9.612 |
| **Skattskyldug inntøka** | **95.700** | **77.772** | **7.975** | **6.481** |
| Landsskattur | -4.605 | -1.916 | -384 | -160 |
| Kommunuskattur | -13.331 | -9.693 | -1.111 | -808 |
| Skattafrádráttur | 16.200 | 10.500 | 1.350 | 875 |
| Kirkjuskattur | -447 | -325 | -37 | -27 |
| Gjald til Heilsutrygd | -2.674 | -2.567 | -223 | -214 |
| Gjald til AMEG | -2.153 | -1.750 | -179 | -146 |
| Kringvarpsgjald | -1.800 | -1.800 | -150 | -150 |
| **Útgoldið** | **128.266** | **107.794** | **10.689** | **8.983** |

| **Miðal fyritíðarpensjón**<br>**Útgoldið við broyting** | ***Støk***<br>ár | ***Gift***<br>ár | ***Støk***<br>mð | ***Gift***<br>mð |
|---|---|---|---|---|
| Grundupphædd | 72.360 | 57.492 | 6.030 | 4.791 |
| Viðbót | 14.652 | 18.684 | 1.221 | 1.557 |
| Eyka viðbót | 33.768 | 33.768 | 2.814 | 2.814 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 |
| Veitingar íalt | 128.388 | 113.748 | 10.699 | 9.479 |
| **Skattskyldug inntøka** | **14.652** | **18.684** | **1.221** | **1.557** |
| Landsskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kommunuskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Brúktur skattafrádráttur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Útgoldin skattafrádráttur | 16.200 | 10.500 | 1.350 | 875 |
| Kirkjuskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Gjald til Heilsutrygd | -2.188 | -2.212 | -182 | -184 |
| Gjald til AMEG | -330 | -420 | -27 | -35 |
| Kringvarpsgjald | -1.800 | -1.800 | -150 | -150 |
| **Útgoldið** | **140.270** | **119.816** | **11.689** | **9.985** |
| **Hækking** | **12.004** | **12.022** | **1.000** | **1.002** |

| **Lægsta fyritíðarpensjón**<br>**Útgoldið sambært galdandi lóg** | ***Støk***<br>ár | ***Gift***<br>ár | ***Støk***<br>mð | ***Gift***<br>mð |
|---|---|---|---|---|
| Grundupphædd | 72.360 | 57.492 | 6.030 | 4.791 |
| Viðbót | 22.032 | 17.688 | 1.836 | 1.474 |
| Eyka viðbót | 34.080 | 34.080 | 2.840 | 2.840 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 |
| Veitingar íalt | 136.080 | 133.064 | 11.340 | 9.422 |
| **Skattskyldug inntøka** | **94.392** | **75.180** | **7.866** | **6.265** |
| Landsskattur | -4.409 | -1.527 | -367 | -127 |
| Kommunuskattur | -13.065 | -9.167 | -1.089 | -764 |
| Skattafrádráttur | 16.200 | 10.500 | 1.350 | 875 |
| Kirkjuskattur | -438 | -307 | -36 | -26 |
| Gjald til Heilsutrygd | -2.666 | -2.551 | -222 | -213 |
| Gjald til AMEG | -2.124 | -1.692 | -177 | -141 |
| Kringvarpsgjald | -1.800 | -1.800 | -150 | -150 |
| **Útgoldið** | **127.778** | **106.520** | **10.648** | **8.877** |

| Lægsta fyritíðarpensjón<br>Útgoldið við broyting | *Støk*<br>ár | *Gift*<br>ár | *Støk*<br>mð | *Gift*<br>mð |
|---|---|---|---|---|
| Grundupphædd | 72.360 | 57.492 | 6.030 | 4.791 |
| Viðbót | 13.860 | 17.064 | 1.155 | 1.422 |
| Eyka viðbót | 34.080 | 34.080 | 2.840 | 2.840 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 |
| Veitingar íalt | 127.908 | 112.440 | 10.659 | 9.370 |
| **Skattskyldug inntøka** | **13.860** | **17.064** | **1.155** | **1.422** |
| Landsskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kommunuskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Brúktur skattafrádráttur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Útgoldin skattafrádráttur | 16.200 | 10.500 | 1.350 | 875 |
| Kirkjuskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Gjald til Heilsutrygd | -2.183 | -2.202 | -182 | -184 |
| Gjald til AMEG | -312 | -384 | -26 | -32 |
| Kringvarpsgjald | -1.800 | -1.800 | -150 | -150 |
| **Útgoldið** | **139.813** | **118.554** | **11.651** | **9.879** |
| **Hækking** | **12.035** | **12.034** | **1.003** | **1.003** |

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Samanumtikið hevur hetta uppskotið einsamalt við sær, at skattskyldugu viðbøturnar hjá fyritíðarpensjónistum lækka, men saman við skattafrítøku av grundupphædd og útgjaldi av pensjónistafrádrátti – økist samlaða útgjaldið fyri tann einstaka við áleið 1.000 kr. mánaðarliga.

Endamálið er at tillaga viðbøturnar samstundis, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggur fram uppskot um at strika skattin av grundarupphæddini og at lata óbrúktan skattafrádrátt fella aftur til fyritíðarpensjónistin, sí løgtingsmál nr. 26/2017.

Samanlagt hava bæði uppskotini við sær, at tey ið fáa fyritíðarpensjón fáa ein lætta á 1000 kr. um mánaðin í 2018.

Arbeitt verður við at finna tøkniliga loysn á útgjaldi av frádráttinum mánaðarliga.

Virknaður er treytaður av, at tað tøkniliga letur seg  gera at rinda frádráttin út mánaðarliga.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Umframt at verða lagt fram til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Føroya Landsstýri verður uppskotið sent beinleiðis til niðanfyri nevndu hoyringspartar:

- Almannaverkið
- Landsfelag Pensjónista
- MBF

- Kommunufelagið

Uppskotið varð ikki sent í hoyring fyrr enn eftir framløgu. Ongi hoyringssvar ella ummælisskjøl eru tí hjáløgd.

Hoyringssvar verða send Løgtinginum eftir, at hoyringsfreistin er úti, tann 9. oktober 2017.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar bæði fyri landið og kommunurnar.

Avleiðingarnar av uppskotinum mugu síggjast í samanhangi við áðurnevnda uppskot til broyting í skattalógini.

Roknað verður við, at bæði uppskotini samanlagt fara at hava við sær eina meirinntøku fyri landið á góðar 9,4 mió. kr. árliga. Landið sparir umleið 21,8 mió. kr. av, at veitingar verða broyttar, men missir 12,5 mió. kr. í landsskatti av, at veitingar verða skattafríar, og frádráttur verður útgoldin.

Fyri kommunurnar koma bæði uppskotini samanlagt at hava við sær minni skattainntøkur á umleið 25 mió. kr. árliga.

Eisini inntøkurnar hjá Fólkakirkjuni, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum og Heilsutrygd lækka vegna broytingarnar. Roknað verður við, at kirkjuskatturin lækkar við 800 tús. kr., gjaldið til AMEG lækkar við 3,0 mió. kr., og at gjaldið til Heilsutrygd lækkar við 800 tús. kr.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri Almannaverkið ella fyri kommunurnar. Mánaðarliga útgjald av frádráttin metast at hava umsitingarliga avleiðingar fyri Taks.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri eitt ávíst øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur saman við broytingunum í Skattalógini við sær, at inntøkan hjá fyritíðarpensjónistum aftaná skatt hækkar við 1000 kr. um mánaðin. Virknaðurin er treytaður av, at tað eydnast Fíggjarmálaráðnum at broyta skipanina hjá TAKS, so metti óbrúkti frádrátturin kann rindast skattgjaldaranum mánaðarliga í inntøkuárinum. Men enn ber tó ikki til at siga við vissu, hvussu hetta verður gjørt tøkniliga.

Fyritíðarpensjónistar, sum flyta úr Føroyum til Danmarkar ella Grønland, kunnu taka pensjónina við í upp til trý ár. Pensjónin, ið verður goldin úr Føroyum, verður skattað í Danmark ella Grønlandi eftir teirra reglum. Hetta uppskotið hevur, saman við uppskotinum um broyting í skattalógini, við sær, at inntøkan eftir skatt økist, men veitingin áðrenn skatt lækkar. Fyritíðarpensjónistar, sum flyta til aðrar partar av kongaríkinum, fáa sostatt ikki ágóða av broytingunum – tvørturímóti fer inntøkan hjá teimum eftir skatt at lækka nakað. Tað er bert okkurt einstakt dømi um fyritíðarpensjónistar, sum flyta úr Føroyum til Danmarkar ella Grønland og taka pensjónina við sær. Skal hesin persónskari ikki merkja broytingar, mugu lógarbroytingar umhugsast, ið lata upp fyri serligari uttanlandsviðbót til hesar persónar.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið kann hava avleiðingar í mun til norðurlendska sáttmálan um almannatrygd.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Marknaforðingar**
Fyritíðarpensjónistar, sum flyta til Danmarkar, fáa ikki ágóða av broytingunum – tvørturímóti fer inntøkan hjá teimum eftir skatt at lækka nakað. Tað er bert okkurt einstakt dømi um fyritíðarpensjónistar, sum flyta úr Føroyum til Danmarkar og taka pensjónina við sær.

Sama ger seg galdandi fyri fyritíðarpensjónistar, sum flyta til onnur Norðurlond, tó at trý ára avmarkingin, sum er galdandi fyri Danmark, ikki ger seg galdandi, tí talan er um sáttmálaøkið fyri norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd. Hvussu møgulig skatting fer fram í ymsu Norðurlondunum er treytað av dupultskattaavtalum og skattaskipanini annars í einstaka landinum.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunurnar.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

# Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

## 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1**
Lógarbroytingin hevur við sær, at viðbót til hægstu fyritíðarpensjón lækkar úr 71.928 kr. niður í 49.452 kr. um árið fyri stakar fyritíðarpensjónistar.

**Til § 1, nr. 2**
Lógarbroytingin hevur við sær, at viðbót til hægstu fyritíðarpensjón lækkar úr 64.944 kr. niður í 51.420,00 kr. um árið fyri giftar fyritíðarpensjónistar.

**Til § 1, nr. 3**
Lógarbroytingin hevur við sær, at viðbót til miðal fyritíðarpensjón lækkar úr kr. 23.340,00 til: 14.652,00 kr. um árið fyri stakar fyritíðarpensjónistar.

**Til § 1, nr. 4**
Lógarbroytingin hevur við sær, at viðbót til miðal fyritíðarpensjón lækkar úr kr. 20.280 til 18.684,00 kr. um árið fyri giftar fyritíðarpensjónistar.

**Til § 1, nr. 5**
Lógarbroytingin hevur við sær, at viðbót til lægstu fyritíðarpensjón lækkar úr kr. 22.032 til 13.860,00 kr. um árið fyri stakar fyritíðarpensjónistar.

**Til § 1, nr. 6**
Lógarbroytingin hevur við sær, at viðbót til lægstu fyritíðarpensjón lækkar úr kr. 17.668 til 17.064,00 kr. um árið fyri giftar fyritíðarpensjónistar.

**Til § 2**
**Til stk. 1.**
Áseting um gildiskomu. Broytingin er galdandi fyri útgjald av veitingum frá og við februar mánaði 2018. Fyri útgjøldini fram til februar mánað eru árligu upphæddirnar framhaldandi kr. 71.928,00 fyri viðbót til hægstu fyritíðarpensjón - støk, kr. 64.944,00 fyri viðbót til hægstu fyritíðarpensjón - gift hvør, kr. 23.340,00 fyri viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk, kr. 20.280,00 fyri viðbót til miðal fyritíðarpensjón - gift hvør, kr. 22.032,00 til viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – støk og kr. 17.688,00 til viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – gift hvør.

**Til stk. 2.**
Av tí at broyttu upphæddirnar til viðbót til fyritíðarpensjónistar verða galdandi fyri útgjald frá og við februar mánaða 2018 og sostatt fyri 11 mánaðar og ikki 12, sum vanligt er, eins og at § 5 í lóg um áseting og javning sigur, at upphæddirnar skulu kunna býtast við 12, er neyðugt við eini skiftisreglu, ið greitt tilskilar, at samlaða upphæddin, ið verður útgoldin í 2018, verður útgoldin í 11 ratum, og tí stendur, at hon verður býtt við 12 og faldað við 11.

Almannamálaráðið, 26. september 2017

**Eyðgunn Samuelsen**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Fylgiskjal 1: Javntekstur**